# Fólk skulu hava góðar upplivingar

**– Drívmegin hjá mær hevur øll árini verið, at fólk skulu hava góðar upplivingar við livandi tónleiki, sigur Brandur Øssursson, sum er maðurin aftan fyri Jazzfestivalin. Í ár fyllir festivalurin 20 ár**

ELDSÁL
*Eyðun Klakstein*

Hann kann tosa sannførandi og fegin um allar tónleikabólkar, sum hann hevur á sínum festivalum, og hann dugir at gera sjálvt tann mest ókenda bólkin áhugaverdan á onkran hátt. Maðurin er Brandur Øssursson, sum í 20 ár hevur staðið aftan fyri Tórshavnar Fólka, Blues og Jazz festival – ella sum fólk bara siga, Jazzfestivalin.

Hann brennir fyri tónleikinum, og grundin til, at hann øll hesi árini hevur havt hug til at taka tað stóra takið við festivalinum, er púra einføld.

– Drívmegin hjá mær hevur øll árini verið, at fólk skulu hava góðar upplivingar við livandi tónleiki. Popptónleikur á fløgu er at hoyra allastaðni, tú kemur, og tí er tað gott, at fólk við hvørt sleppa at hoyra góðan livandi tónleik, sigur Brandur Øssursson.



*Rókur Jakobsen og hinir í MC Hár verða eitt av føroysku nøvnunum, sum skulu spæla á Jazzfestivalinum í ár. MC Hár spælir saman við Déjá Vu í Norðurlandahúsinum hóskvøldið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Gjørdu álvara av hugskoti

Hugskotið til Jazzfestivalin kom fyrst í áttatiárunum, tá ið Brandur var føroyskt umboð í felagsskapinum Nordjazz. Tey plagdu at hittast til fundir á ymiskum jazzfestivalinum í Norðurlondum, og tá ið leiðin í 1983 gekk til Finnlands, segði Brandur við seg sjálvan, at slíkan festival bar eisini til at gera í Føroyum.

– Í Finnlandi spældu fleiri verðinsnøvn innan jazz, men spælistøðini vóru ikki nakað serligt. Konsertir vóru í fimleikahøllum, á matstovum og aðrastaðni. Tá hugsaði eg við mær sjálvum, at hetta kunnu vit gera betur í Føroyum, greiðir Brandur frá.

Hann og danin Poul Jørgensen gjørdu álvara av hugskotinum, og longu í 1984 var fyrsti festivalurin komin á plakatina.

– Umstøðurnar at halda ein festival í Føroyum vórðu júst tá blivnar nógv betur, tí føroyingar fingu tá Norrønu, Hotel Føroyar og Norðurlandahúsið, so alt í einum var bæði flutningur, innivistur og konserthøll tryggjað, greiðir hann frá.

## Nógv nøvn

Á fyrsta festivalinum í 1984 spældu millum annað Blast, Pia Raug, Svend Amundsen og Lilian Bauté. Síðani hevur ein ørgrynna av føroyskum og útlendskum nøvnum spælt á Jazzfestivalinum, og Brandur heldur, at talan er um í minsta lagi 3000 tónleikarar, sum hava verið á pallinum hesi 20 árini.

Nøvn sum Mazzoforte, Bjørn Afzelius, Kim Larsen og hópin av øðrum kendum útlendskum nøvnum hava havt framførlsur á Jazzfestivalinum, og so seint sum í fjør var Stig Rossen eitt tað heitasta konsertnavnið í føroyska tónleikasummarinum.

– Tað hevur verið ymiskt, hvussu tey ymisku nøvnini hava verið at arbeitt saman við. Tær donsku rockdamurnar hava drigið sera nógv fólk, men tað hevur verið eitt sindur ósjarmerandi at arbeitt saman við teimum, tí tú hevur ongantíð tosað beinleiðis við kunstnaran, og alt uttan um tær er sera kommersielt. Tey hava fólk at taka sær av øllum, og hesi fólk skulu helst arbeiða soleiðis, at tey kenna seg hava stóran týdning fyri konsertina, sigur Brandur Øssursson.

– Men tá hesi nøvnini so er komin á pallin, so hava tey givið nøkur fantastisk show.

Brandur vísir hinvegin á, at tónleikarar sum Bjørn Afzelius og Svend Amundsen hava verið góðir at arbeiða saman við, hóast teir eisini eru kendir.

Brandur Øssursson heldur, at Jazzfestivalurin hevur havt góða ávirkan á føroyskan tónleik og samfelagi sum heild hesi 20 árini.

– Í 1984 var tað ein stórhending, tá ið kend útlendsk nøvn komu hendan vegin at spæla, men vit gjørdu tað til nakað afturvendandi, og tað haldi hevur givið føroyingum eitt annað forhold til útlendskan tónleik. Nú var tað ikki longur nakað, sum mann bara hoyrdi í útvarpinum ella sá í sjónvarpinum, nú var tað nakað, sum tú kundi uppliva live í Føroyum.

– Tað er umráðandi at fáa livandi tónleik út til fólkið, og aftur í ár kunnu vit bjóða eina hugnaligan og glaðan festival, sigur Brandur Øssursson, sum í dag kann fegnast um, at 20. Jazzfestivalurn fer av bakkastokki.



*– Tað er umráðandi at fáa livandi tónleik út til fólkið, og aftur í ár kunnu vit bjóða eina hugnaligan og glaðan festival, sigur Brandur Øssursson, sum í dag kann fegnast um, at 20. Jazzfstivalurn fer av bakkastokki*

## 20. Tórshavnar Jazz, Fólka og Blues Festival

**Týsdagur 1. juli**

| | | |
|---|---|---|
| 15:00-16:00 | Spælimenninir | Gongugøtan, FK |
| 16:00-17:00 | Gentlemen of Jazz | Gongugøtan, Vaglið |
| 19:30:21:00 | Gentlemen of Jazz | Listaskálin (kr. 60) |
| 21:00-23:00 | Spælimenninir | Havnar Klubbi |

**Mikudagur 2 juli**

| | | |
|---|---|---|
| 15:00-16:00 | Trio de Janeiro | Gongugøtan, FK |
| 16:00-17:00 | Orbit Big Band | Gongugøtan, Vaglið |
| 16:30-17:00 | Gentlemen of Jazz | SMS |
| 19:30-22:00 | Pele Møller Band | |
| | Maria Guttesen Band | Norðurlandahúsið (kr. 100) |
| 21:30-23:00 | Orbit Big Band | Gamla Meiaríið |

**Hósdagur 3. juli**

| | | |
|---|---|---|
| 15:00-16:00 | Tjant | Gongugøtan, FK |
| 16:00-17:00 | Paradox | Gongugøtan, Vaglið |
| 16:30-17:00 | Trio de Janeiro | SMS |
| 19:30-22:00 | Déjá Vu & MC Hár | Norðurlandahúsið (kr. 100) |
| 19:30-21:00 | Orbit Big Band | Listaskálin (kr. 60) |
| 21:30-23:00 | Enekk & Yggdrasil | Gamla Meiaríið (kr. 60) |

**Fríggjadagur 4. juli**

| | | |
|---|---|---|
| 15:00-16:00 | Paradox og Toxic | Gongugøtan, FK |
| 15:00-16:00 | Irving Anckers Sekstet | Tilhaldið |
| 16:00-17:00 | Pele Møller Band | Gongugøtan, Vaglið |
| 17:30-18:30 | Irving Anckers Sekstet | Havnar Klubbi |
| 19:30-21:00 | Tom Nagel Rasmussen Band | Listaskálin (kr. 80) |
| 20:00-20:30 | Gospeltrio | SMS |
| 21:30:23:00 | Paradox, Toxic & Monkey Mongolia | Gamla Meiaríið (kr. 60) |
| 23:00-03:00 | Trio de Janeiro | |
| | Maria Guttesen Band | |
| | Headache Blues Treo | Havnar Klubbi (kr. 100) |

**Leygardagur 5. juli**

| | | |
|---|---|---|
| 11:30-12:30 | Irving Anckers Sekstet | Gongugøtan, Vaglið |
| 12:30-13:30 | Søren Søgaard Blues | Gongugøtan, FK |
| 19:30-21:00 | Irving Anckers Sekstet | Listaskálin (kr. 60) |
| 21:30-23:00 | Søren Søgaard Blues | |
| | Headache Blues Treo | Gamla Meiaríið (kr. 60) |
| 23:00-03:00 | Pele Møller Band | |
| | Gospeltrio | Havnar Klubbi (kr. 100) |



# Føroyskur tónleikur í miðdeplinum

**Føroyskir tónleikarar sleppa at breiða seg á 20. Jazzfestivalinum, sum byrjar í dag. Konsertir verða ymsastaðni í Havnini, og nógvur tónleikur verður spældur úti á gøtuni**

JAZZFESTIVALURIN
*Eyðun Klakstein*



*Maria Guttesen kemur heim at hava tvær konsertir á Jazzfestivalinum. Hon fer at spæla saman við beiggja sínum Gunnari og einum donskum brøðrapari*

Í dag byrjar Tórshavnar Jazz, Fólka og Blues Festivalurin, og í ár er tað 20. ferð, at hendan tónleikastevnan verður hildin í høvuðsstaðnum.

Í ár verður tað føroyskur tónleikur, sum verður í miðdeplinum, men útlendskir tónleikagestir koma eisini til landið at spæla. Nøvnini eru kanska ikki so kend, sum tey plagdu at vera, men talan er um ymiskan og góðan tónleik.

Konsertir verða hildnar á ymsum støðum í Havnini. Tvær konsertir verða í Norðurlandahúsinum, har høvuðssætið hjá festivalinum plagdi at vera, áðrenn Listastevnan gjørdist flaggskipið hjá húsinum.

Gamla Meiaríið, Havnar Klubbi, Tilhaldið, Listaskálin og SMS fara eisini at hýsa konsertum á Jazzfestivalinum, og so verður eisini nógvur tónleikur spældur úti á gøtuni.

Frá í dag og fram til leygardagin verða hvønn dag framførslur við FK í Dr. Jacobsens gøtu og á Vaglinum. Hesar framførslur verða mitt á degnum og koma tí uttan iva at seta dám á býarlívið hesa vikuna.

Aðrastaðni her á síðuni ber til at fara ígjøgnum skránna fyri festivalin, men vit skulu her tríva í nøkur av nøvnunum, sum fara at spæla Jazzfestivalinum hesaferð.



*Ein gospeltrio við Sigrid Sivertsen á odda fer at hava framførslur á Jazzfestivalinum*

## Maria Guttesen heima

Tvey av nøvnunum, sum koma úr útlandinum, eru meira og minni føroysk. Maria Guttesen, sum telist millum okkara kendu sangkvinnur, fer at spæla saman við einum bólki, har bæði føroyingar og danir eru við.

Saman við Mariu spælir beiggi hennara Gunnar, og harafturat verða donsku brøðurnir Stephen og Johannes Nørlykke við í bólkinum

Guttesen-systkini kenna føroyingar væl. Tey hava verið virkin í føroyskum popp- og gospeltónleiki í nógv ár og hava fleiri tónleikaútgávur aftanfyri seg.

Brøðurnir Nørlykke eru kendir í tónleikaumhvørvinum í Århus. Teir hava spælt saman við nøvnum sum Karen Busck, Tinu Dickow og Juliu Michelsen.

Maria Guttesen hitti Stephen Nørlykke á Musikkonservatorinum í Århus, og tey hava síðani arbeitt nógv saman – millum annað undir navninum Devided Minds. Tey hava seinastu tíðina arbeitt við fløgu, sum nú er til reiðar at geva út.

Maria Guttesen Band spælir í Norðurlandahúsinum mikukvøldið og í Havnar Klubba fríggjakvøldið.

## Pele úr Grønlandi

Úr Grønlandi kemur Pele Møller Band, og her er eisini eitt føroyskt ískoyti í bólkinum. Tað er Rói Eliasen, sumspælir klaver í bólkinum.

Pele Møller er víðagitin í Grønlandi, og hann er kendur fyri at spæla léttan og melodisøan jazztónleik við grønlendskum sangi. Meginparturin av tí, hann spælir, hevur hann sjálvur gjørt, og bólkurin hjá honum hevur givið út átta fløgur.

Trio de Janeiro er bólkur, sum hevur spælt síðani 1986, og tær mongu ferðirnar til Brasil hevur givið bólkinum íblástur til tónleikin hjá sær.

Í bólkinum spælir millum annað sonur Halfdan Rasmussen, og umframt framførslurnar við Trio de Janeiro fer Tom Nagel Rasmussen eisini at hava eina konsert, har hann spælir sangir hjá pápa sínum.

## Nógv ymiskt føroyskt

Føroyskir tónleikarar spæla alla dagarnar, meðan festivalurin er. Á fyrsta degnum eru tað Spælimenninir, sum fara at spæla lívligan spælimanstónleik, og síðani er nógv ymsitk á skránni.

Hóskvøldið verður konsert í Norðurlandahúsinum, har tveir bólkunum, sum gjørdu nógv vart við seg í Prix Føroyum, fara at spæla. Déjá Vu endaði sum nummar tvey í kappingini í ár, og teir hava verið uttanlands og spælt á festivali í summar. Saman við teimum fer MC Hár at spæla, og tann bólkurin er garantur fyri lívligari framførslu.

Seinni hóskvøldið spælir Enekk í Gamla Meiarínum, og har verður Yggdrasil eisini við.

Ein gospeltrio við Sigrid Sivertsen á odda fer at hava framførslur í SMS og í Havnar Klubba, og leygarkvøldið verður blueskvøld við Søren Søgaard og Headache Blues Treo í Havnar Klubba.

Seinasta konsertin á Jazzfestivalinum verður leygarkvøldið frá kl. 23.00 og út á náttina í Havnar Klubba. Tá hava slakar 30 konsertir verið í høvuðsstaðnum.



*Úr Grønlandi kemur Pele Møller, sum hevur ein føroying við í bólkinum hjá sær*



*Headache Blues Treo, har Uni Debess er frontmaður, spælir fríggjakvøldið og leygarkvøldið í Havnar Klubba. Mynd: Álvur Haraldsen*